

*Páll Isholm, leiðari á handilsskúlanum á Kambsdali er sannførdur um, at skúladepilin við Marknagil veður miðdepilin fyri alt føroyskt miðnám*











*Eftir ætlan skal skúladepilin við Marknagil kosta 391 milliónir krónur og vera liðugur í 2014*

## Økisupptøkan

Somuleiðis heldur Páll Isholm, at stórt spurnartekin verður sett við økisupptøkuna, sum er til studentaskúlarnar.

Í løtuni skulu allir næmingar úr Norðoyggjum til og við Hósvík ganga í studentaskúla á Kambsdali. Suðuroyingar ganga í Hovi og restin av landinum skal ganga í Havn. Hetta er ikki galdandi fyri hinar miðnámsskúlarnar.

– Økisupptøkan er gjørd til eina tíð við heilt øðrvísi samferðslumøguleikum enn vit koma at hava um nøkur ár, og tí er tað eitt spurningur, sum heilt víst eisini kemur upp at venda, sigur Páll Isholm.

Hann spyr í sama viðfangi, um tað er nakað hugskot at tvinga næmingarnar at ganga á nøkrum ávísum skúla, tá tað helst verður styttri av Nesi til Havnar enn á Kambsdal.

Hinvegin ivast hann ikki í, at skúlarnir kring landið fara at liva eisini.

– Vit mugu á ongan hátt undirmeta skúlarnar á Kambsdali seinastu nógvu árini, men vit mugu fyrihalda okkum til, at fyritreytirnar verða broyttar, meinar Páll Isholm.

## Vónar tað besta

Hallið á fíggjarlógini er heilt stórt, og verður neyvan minni á eini komandi fíggjarlóg, og truplar tíðir eru ofta sera truplar víkjandi útbúgving, men Páll Isholm ivast ikki í, at skúlin verður liðugur í 2014.

– Eg rokni við og hopi, at skúladepilin verður liðugur til tíðina. Tað sær realistiskt út, og depilin verður heilt víst eitt stórt frambrot fyri allan skúlaskap í Føroyum, sum fer at skapa møguleika fyri nógvum, sum er púra ógjørligt í dag, sigur Páll Isholm, skúlaleiðari á Handilsskúlanum á Kambsdali.